## Campbell til Portsmouth

Portsmouth tykist nú vera farið undir at brúka pengarnar, sum ríki russiski eigarin, Sasha Gaydamak, hevur lovað felagnum. Í fjør rakk tað akkurát til at sleppa undan niðurflyting, men nú tykist Harry Redknapp vera sloppin framat pengapunginum. Í gjár fekk felagið so undirskriftina frá Sol Campbell, sum fram til í fjør var rimmar-fastur í Arsenal-verjuni. Hartil tykist felagið ætlað at keypa David James úr Manchester City, meðan Glen Johnsson (læntur úr Chelsea) og David Thompson úr Wigan longu eru komnir til felagið.

**-mørk**

## Morten Olsen trýr upp á FCK

Í kvøld skulu donsku meistararnir úr FCK royna seg móti Hollendska Ajax í seinasta undanumfarinum áðrenn sjálvt bólkaspælið í Champions League. Og hóast nógv meta Ajax sum favorittar, so heldur danski landsliðsvenjarin, at FCK hevur ein góðan møguleika. – Eg vil siga, at tað er fifty-fifty. Ajax hevur nokk eitt lítið sindur betri hóp, men FCK er komið sera væl ígongd í heimligu kappingini. Teir hava longu víst, at teir hava eitt væl virkandi kollektiv, meðan kappingin hjá Ajax als ikki er byrjað.

**-mørk**

ÍF – HB 1-3 (0-0)

# HB avgjørdi síðsta hálva tíman

*ÍF*

*HB*

**Tá ein tími var spældur var dysturin framvegis málleysur, men seinasta hálva tíman fekk HB bóltin í netið tríggjar ferðir og gjørdu teir harvið sítt, fyri at fylgja við oddaliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Høgni Zachariassen roynir at steðga Janus Joensen, og tað riggaði eisini í ein ávísan mun, men seinasta hálva tíman var tað ongin frá ÍF, sum megnaði at steðga HB*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

HB hevði allar mans tøkar nú teir skuldu fara undir seinnu hálvu í landskappingini. Málverjin Bárður Johannesen, sum hevur verið úti við skaða, var tøkur og hevði fingið afturval millum stengurnar, og uppi í hinum endanum var Rógvi Jacobsen við í landskappingardysti fyri fyrstu ferð, síðani hann kom aftur úr Íslandi.

Fuglfirðingar hava eisini fingið styrk í mun til fyrru hálvu. Tveir leikarar eru komnir aftrat, sum skulu styrkja um offensivapartin hjá liðnum, og eita teir Saric Nenad og Amin Fallah.

Hinvegin hevur ÍF sagt farvæl við Atla Petersen, sum flytur niður fyrsta dagin, og tað er avgjørt ein missur fyri fuglfirðingar. Haraftrat var Aleksander Jovevic leikbannaður og fekk ikki verið við.

### Vánaligur fyrri hálvleikur

Vertirnir fingu helst betru byrjanina upp á dystin, men sum fyrri hálvleikur leið tóku gestirnir spakuliga yvir. Longi gekk tó áðrenn teir heilt stóru málmøguleikarnir komu, og tann størsta av slagnum fekk HB, tá Jóhan Ejvind vann ein nærdyst við Fritleif í Lambanum og aftan á legði eitt frálíkt innlegg til Rógva Jacobsen, sum tó stútaði beint á málverjan, og harvið spurdist ikki meiri burtur úr tí.

Fyrri hálvleikur var tó lítið undirhaldandi, og tá málmøguleikarnir heldur ikki vóru teir nógvu, var tað lítið hugaligt at standa sum áskoðari í regninum í Fuglafirði.

### Innskiftarar avgjørdu

Hetta broyttist tó í seinna hálvleiki, tí tá varð dysturin meiri undirhaldandi og mál fingu vit eisini fleiri av.

ÍF byrjaði betur og trýsti HB aftur á vøllin. Gestirnir vórðu tí noyddir at dúva upp á kontra, og tað var júst upp á eitt av hesum kontra álopunum, at HB legði seg á odda.

Mortan úr Hørg legði frá miðvøllinum eina sera góða sending niðan í høgra borð til Rógva Jacobsen. Hann rak eitt lítið petti við bóltinum, áðrenn hann legði tvørtur um til Jákup á Borg, sum setti innaru síðuna á og legði HB á odda.

Hetta hendi, tá ein góður tími var spældur, og fýra minuttir seinni øktu gestirnir um leiðsluna.

Hesaferð er tað málskjúttin Jákup á Borg, sum er upphavsmaðurin til málið, sum Rókur Jespersen skorar. Jákup driblar verjuna tunna úti í høgru síðu og rekur inn í vøllin. Hegnisliga leggur hann síðani bóltin inn um verjuna til innskifta Rók, sum skjýtur hart og flatt undir málverjan til støðuna 2-0.

Fyrsta málið hjá HB kom, tá 61 minuttir vóru spældir. Næsta málið tá 65 minuttir vóru spældir, og ÍF skorar triðja málið í dystinum, tá 67 minuttir eru farnir.

Bartal Eliasen kempar fyri at vinna bóltin men fer um koll, og ÍF vil hava brotsspark. Hetta fáa teir ikki í fyrsta atløgu og fer bólturin víðari til Hanus Eliasen. Meðan hann temur bóltin verður hann sparkaður, og tá Hanus onki ger fyri at varðveita javnvágina, fer hann um koll. Hesaferð floytar dómarin, og Bartal Eliasen buldrar brotssparkið í netið og minkar um munin.

Hóast ÍF hevði onkran fínan møguleika at javna aftan á hetta, sá tað út til, at HB hevði tamarhald á tí heila, og tí var tað eisini í lagi, tá ein annar innskiftur HB-leikari, Tór-Ingar Akselsen, skoraði fimm minuttir fyri leiklok.

Hetta var ikki ólíkt tí fyrsta hjá HB. Jákup á Borg og Rókur Jespersen spæla verjuna sundur og saman, áðrenn Jákup leggur bóltin tvørtur um til Tór-Ingar, sum uttan stórvegis hóvasták leggur bóltin í netið og staðfesti sigurin.

Eitt vælspælt álop og eitt fint mál hjá Tór-Ingar.

### Gjørdu sítt

Við sigrinum gjørdu HB sítt til at fylgja oddaliðnum EB/Streymi. HB-liðið var langt frá sannførandi í fyrra hálvleiki, men seinasta hálva tíman av dystinum vístu teir góðar taktir og tað kastaði trý mál av sær.

Við sigrinum minkaði HB um fjarstøðuna upp til EB/Streym, soleiðis at nú eru fimm stig á muni. Hetta gloppið kann gerast minni, tí leygardagin skal HB norð á Mølina at vitja oddaliðið.

Vinnur HB dystin sær tað brádliga heilt gott út, meðan tapa teir er støðan sum hon var undan dystinum móti ÍF.

Fuglfirðingar hava hinvegin ein lítlan trupulleika eftirhondini. Teir eru aftastir men kunnu ugga seg við, bæði B68 og VB/Sumba eisini taptu sínar dystir, so enn sær tað ikki heilt vónleyst út.

**A www.portal.fo ber til at síggja videoupptøkur við málum og samrøðu frá dystinum**

## Innskiftarar brúktu 7 minuttir hvør

Bæði Tór-Ingar Akselsen og Rókur av Fløtum Jespersen sluppu at byrja dystin ímóti ÍF á bonkinum. HB-venjarin, Krzysztof Popczynski, hevur skift nógv ímillum leikararnar til startuppstillingarnar í ár, og í gjár vóru teir báðir offensivu kapasitetarnir settir á bonkin frá byrjan.

Teir komu tó báðir inn og brúktu teir akkurát sjey minuttir hvør, fyri at sleppa á máltalvuna.

Rókur av Fløtum Jespersen varð settur á vøllin í 60. minutti fyri Emil Nolsøe Leifsson, og í 67. minutti fekk hann bóltin í netið.

Tór-Ingar Akselsen kom inn fyri 78. minutti fyri Rógva Jacobsen, og í 85. minutti skoraði hann, og brúkti júst sum Rókur bert sjey minuttir frá tí hann komin á vøllin, til hann fekk bóltin í málið.

Teir báðir Emil Nolsøe Leifsson og Rógvi Jacobsen fóru báðir málleysir av vøllinum, og tá báðir teirra avloysarar fingu bóltin í netið og gjørdu tað gott á vøllinum, er tað ikki ósannlíkt, at annar teirra verður við frá byrjan í móti EB/Streymi leygardagin.

**-rwd**

# Bárður komin fyri seg

Málverjin Bárður Johannesen hevur sitið úti stóran part av árinum við skaða. Áðrenn landskappingin fór í summarfrí byrjaði hann so smátt at venja aftur, og í dystinum móti ÍF stóð hann aftur millum stengurnar báðar og vardi reyð/svarta málið.

Bárður hevði eisini ein rættiliga avgerandi leiklut í dystinum í Fuglafirði.

Í staðin fyri at dysturin endaði 3-1 til HB, kundi hann eins væl endað við javnleiki 2-2. Minuttin fyri, at HB skoraði trúu teir allar flestu fuglfirðingarnir, at heilfluktarin frá Hanus Eliasen sat uppi í málhorninum, men áðrenn bólturin kom so langt, hevði Bárður verið og vart fyri frágera góða skotinum við eini framúrskarandi bjarging.

Við tí prógvaði hann ikki bara, hví hann so oftani hevur verið inni í landsliðshitanum, men eisini, at hann nú er komin fyri seg eftir skaðan.

– Jú, tað er deiligt at vera aftur, og eg meti eisini, at eg eri rímiliga væl fyri, viðgekk HB-málverjin eftir dystin.

– Vit settu okkum fyri at vit skuldu hava trý stig burtur úr dystinum, og tað skuldu vit fáa við at spæla okkara spæl. Tað riggaði so seinasta hálva tíman, og tað eru vit glaðir fyri, sigur Bárður Johannesen.

*Hvussu síggja tit so upp á dystin leygdardagin móti EB/Streymi?*

– Tað taka vit sum eina stóra uppgávu. Teir eru sera vælkoyrandi, men vit fara eftir sigrinum og tað fer at krevja nógv av okkum, men í síðsta enda er tað ikki verri enn so, at vit bara skulu halda tætt og skora eitt mál, og tað fara vit at royna at gera við at spæla okkara spæl, segði Bárður Johannesen eftir sigurin í Fuglafirði í gjár.

**-rwd**